

## Fakta

### Fimm bylgjur av jødiskum innflytarum undan 1948:

***Fyrsta bylgja***, 1882-1903: uml. 35.000, úr Russiska Ríkinum og nakrir úr Yemen
***Onnur bylgja***, 1904-1914: 40.000, úr Russiska Ríkinum
***Triðja bylgja***, 1919-1923: 40.000, úr Russlandi
***Fjórða bylgja***, 1924-1929: 82.000, úr Póllandi og Ungarn
***Fimta bylgja***, 1929-1939: 250.000, úr Týsklandi og Eysturevropa
***Sætta bylgja***, 1933-1948: uml. 110.000 jødar, úr Póllandi og Eysturevropa



### Palestinsk flóttafólk eftir 1948:

Stutt eftir kríggið í 1948 gjørdust 700.000 palestinar flóttafólk. Í dag metir mann, at fleiri enn fýra milliónir eru palestinsk flóttafólk í útlegd og higartil eru hesi statsleys. Í dag búgva yvir 20.000 palestinar í Danmark.



palestinsku flóttafólkini fóru frá teirra heimi av egnum vilja ella tí teirra leiðarar góvu teimum boð um tað. Hetta kemur eisini fram í kendu skaldsøguni eftir Leon Uris »Exodus«. Uris skrivar at »tað er heilt víst og skjalprógvað, at arabisku leiðararnir ynsktu at vanliga fólkið fór úr Palestina fyri at gera hetta til eitt politiskt eldfimt mál og eitt hernaðarligt vápn«.

Benny Morris eitur umstríddi ísraelski søgufrøðingurin, sum í 80unum viðgjørdi hetta evnið kring flóttafólkini. Hansara arbeið hevur verið við til at broyta ísraelska søgufrøði og eisini ávirka almennu fatanina av føðingini hjá tjóðini Ísrael. Tað, ið mann fekk burturúr kanningararbeiðinum hjá Morris gav einum illgruna um at etnisk útreinsan var farin fram í hesum árunum.

**Kelda:** »Blood and Sand«, David Remnick, 5. mai 2008, The New Yorker

» ...í økinum í 1880unum búðu umleið 450.000 palestinskar arabarar og 25.000 jødar «